# N‡tt sjónband vi› Kulum Rótum

**Trølla-Pætur, Trølla-omman og Kular Røtur flippa út á n‡ggjum sjónbandi vi› nógvum tónleiki, tekningum og ø›rum undirhaldi**

SJÓNBAND
*Ey›un Klakstein*

N‡tt sjónband vi› føroyskum undirhaldi til børnini er komi› út. Talan er um væl umtóktu Kular Røtur, sum á›ur hava givi› tvær fløgur og eitt sjónband út.

N‡ggja sjónbandi› er vi› Kulum Rótum og Trølla-Pæturi. Hon er omma mín, er heiti› á sjónbandinum, sum er tr‡ korter til longdar.

Á bandinum er undirhald til børnini. Tónleikurin hjá Kulum Rótum fær innivist, og somulei›is fær ein filma› søga um Trølla-Pætur og Trølla-ommuna.

Zacharias Hammer hevur filma› søguna, har Trølla-omman fer vi› motorsúkklu, politii› leitar eftir henni, og trøllini vitja á sjúkrahúsi eisini.

### Gera nógv burtur úr

Trølla-Pætur og Trølla-omman eru høvu›sleikarar á sjónbandinum. Jógvan á Høvdanum hevur gjørt tekningar til sangir hjá Kulum Rótum, og tónleikurin er tikin av fløgunum, sum Kular Røtur hava givi› út seinasta ári›, og sum hava ver› so nógv spældar og seldar.

Undan jólum í fjør kom eisini eitt sjónband vi› Kulum Rótum, og ta› var væl umtókt. Hesafer› ver›ur enn meira gjørt burtur úr undirhaldinum. Upptøkurnar til sjónbandi› eru allar n‡ggjar, tær eru gjørdar í heyst.

Studio Pegasus gevur sjónbandi› út, og Føroya Banki og MBM eru høvu›sstu›lar.




*Nú er n‡tt sjónband vi› Trølla-Pæturi, Trøll-ommuni og Kulum Rótum útkomi›*

# Fíggjarnevndin vrakar skattalætta

**Meirilutin í fíggjarnevndini tekur ikki undir vi› uppskotunum hjá andstø›uni um skattalætta frá 1. januar. Uppskotini fáa neyvan meiriluta aftanfyri seg í løgtinginum**

SKATTALÆTTI
*Magnus Dam*

Ta› ver›ur neyvan bíligari at vera føroyingur 1. januar næsta ár. Í øllum førum er ikki líkt til, at løgtingi› samtykkir tvey uppskot frá andsstø›uni um at lækka skattatr‡sti› umlei› 96 milliónir krónur.

Fíggjarnevndin hevur vi›gjørt skattalættan, og hósdagin var› álit skriva› í málinum. Me›an Javna›arflokkurin og Sambandsflokkurin sjálvsagt framvegis mæla løgtinginum til at samtykkja uppskotini, so taka samgonguumbo›ini ikki undir vi› teimum.

### Bí›a eftir landsst‡rinum

Umbo›ini hjá samgonguflokkunum vísa á, at tey eru partur av einari samgongu, sum sjálv arbei›ir vi› skattaspurningum í brei›ari høpi. Samgonguumbo›ini vilja tí bí›a, inntil landsst‡ri› hevur lagt uppskot um skattalætta fyri løgtingi›. Umbo›ini hjá samgonguni ásanna, at skattatr‡sti› í Føroyum er ov høgt, og tey fegnast um uppskotini hjá andstø›uni, men hetta er ikki nóg miki›, til at tey kunnu taka undir vi› uppskotunum.

Sambandsflokkurin og Javna›arflokkurin mæla í uppskotunum løgtinginum til at lækka skattatr‡sti› á lág- og mi›alinntøkunum tvey prosentstig og at hækka barnafrádráttin úr 4.000 upp í 6.000 krónur. Hetta hev›i givi› einari familju, i› forvinnur 300.000 krónur um ári› og hevur tr‡ børn, umlei› 11.000 krónur meira at liva fyri um ári›. Og uppskoti› hev›i kosta› landskassanum umlei› 84 milliónir krónur í færri inntøkum. Andstø›uflokkarnir hava harafturat skoti› upp at hækka serliga pensjónistafrádráttin 1.500-2.000 krónur, og hendan broytingin hev›i kosta› landskassanum 12 milliónir krónur, var meiriluti fyri henni í løgtinginum.

### Bl‡fría heldur ikki bíligari

Í einum tri›ja uppskoti› hevur Hendrik Old, løgtingsma›ur úr Javna›arflokkinum, skoti› upp at lækka avgjaldi› á bl‡fría bensininum 80 oyru. Úr 3,05 kr. ni›ur í 2,25 kr. Hendan broytingin skuldi eftir ætlan koma í gildi beinanvegin, og í ár hev›i hon kosta› landskassanum umlei› eina millión krónur í mistum inntøkum. Næsta ár hev›i kostna›urin av uppskotinum veri› umlei› 11,5 milliónir krónur. Men heldur ikki í hesum førinum taka samgonguumbo›ini undir vi› uppskotinum. Eins og í hinum bá›um uppskotinum vísa samgongutinglimirnir á, at teir framvegis bí›a eftir uppskoti frá landsst‡rinum.

Sambandsflokkurin, sum fyrr í hesari løgtingssetuni hevur lagt uppskot fram um at lækka avgjaldi› á olju, tekur í prinsippinum undir vi› uppskotinum hjá tingmanninum.

### Fólkaflokkurin vil hava skattalætta

Atkvø›ur løgtingi› samsvarandi meirilutanum í fíggjarnevndini, so er greitt, at uppskotini hjá andstø›uni fella. Men spurningurin er, hvørja stø›u Fólkaflokkurin ella einstøk umbo› hjá Fólkaflokkinum fara at hava, tá máli› kemur aftur í løgtingi›.

Fólkaflokkurin hevur sjálvur strongt á at fáa ein skattalætta í longri tí›, og flokkurin hevur sjálvur gjørt eitt uppskot um skattalætta, sum minnir um uppskotini hjá andstø›uni. Flokkurin hevur fleiri fer›ir sagt, at hann er um at missa toli› vi› landsst‡rismanninum í fíggjarmálum, tí einki uppskot um skattalætta er komi› úr hansara hond enn.

Í landsst‡rinum ver›ur arbeitt vi› einum skattalætta og einari n‡ggjari pensiónsskipan, men enn er ikki greitt, nær uppskotini ver›a løgd fram. Óli Breckmann hevur á›ur sagt, at hann fer at atkvø›a fyri uppskotunum hjá andstø›uni, um ikki okkurt líka frægt kemur frá Karsten Hansen, landsst‡rismanni.

Málini um skattalætta koma helst til a›ru vi›ger› í løgtinginum í næstu viku.

# Letur upp fyri stu›li til fríøki

**Fríøki› Úti í Grøv í Klaksvík fær kanska stu›ul av einari n‡ggjari játtan á fíggjarlógini. Øki› fór illa í nógva regninum í september**

FRÍØKI
*Magnus Dam*

Nógva regni› í september skola›i ikki bara vegir og bilar burtur. Nógvur gró›ur fór illa í regninum, tá áir floymdu um áarbakkarnar, og fri›a›a øki› Úti í Grøv í Klaksvík slapp heldur ikki snikkaleyst.

Stóra øki› er serstakt, tí har er avbera fruktagott, og seinastu árini er nógv planta› Úti í Grøv. Skógrøkt landsins skógfri›a›i øki› í 1980, og seinnu árini hevur Klaksvíkar kommuna gjørt nógv vi› at hugna um og frí›ka øki›.

### Skola›i burtur

Men í regninum 18. september var ein partur av gró›ursetingini skola›ur burtur, og tann vakri vøksturin er nú horvin, vísir løgtingsma›urin Jógvan Lützen, løgtingsma›ur úr Fólkaflokkinum, á í einum fyrispurningi til Bjarna Djurholm, landsst‡rismann.

Jógvan Lützen spyr, um nakar møguleiki er fyri, at Klaksvíkar kommuna kann fáa fíggjarligan stu›ul, so fríøki› kann endurreisast skjótast gjørligt.

Í svarinum sigur Bjarni Djurholm, at ta› sum er ikki eru nakrir møguleikar fyri at veita stu›ul, men í fíggjarlógini fyri næsta ár er ein n‡ggj konto, sum møguliga kann koma klaksvíkingum til hjálpar. 500.000 krónur eru settar av til træplanting, og hon er ætla› at stu›la bóndum og ø›rum jar›areigarum til at planta trø og verja jør›ina.

Bjarni Djurholm sigur, at um ein verkætlan um at endurreisa øki› Úti í Grøv fellur undir endamáli› vi› studninginum, so er møguleiki fyri at veita kommununi stu›ul.

Av tí at reglurnar um stu›ulin ikki eru endaliga ásettar enn, kann landsst‡risma›urin kortini ikki veita vissu fyri stu›linum.

### Fornminnini í vanda

Í økinum Úti í Grøv eru eisini nógv fornminni. Talan er helst um toftir frá víkingatí›ini, og hesi eru eisini í vanda, tá i› áin fer upp um áarbakkarnar, vísir Jógvan Lützen á í einum ø›rum fyrispurningi til Tórbjørn Jacobsen, landsst‡rismann.

Tingma›urin vil hava at vita, um landsst‡risma›urin kann seta pening av til útgrevstur av hesum fornminnunum, so tey ikki farast í ringum ve›ri.

Torbjørn Jacobsen sigur í svarinum, at ongar ætlanir eru um at fara undir útgrevstur Úti í Grøv, og at hetta í fyrsta umfari er naka›, sum Fornminnissavni› ger av út frá fakligum meginreglum. Hóast øki› Úti í Grøv og fornminnini eru fri›a›, so hevur Fornminnissavni› ikki mett ta› vera ney›ugt at grava fornminnini út. Um hetta fer at ver›a gjørt ella ikki, kann landsst‡risma›urin ikki svara uppá. Men hann vísir á, at ta› er vi›urkend si›venja, at øll kend fornminni í einum landi ikki ver›a grivin út. Nøkur eiga at fáa fri› til komandi ættarli› at granska.

Landsst‡risma›urin sigur kortini, at Undirvísingar- og mentamálast‡ri› fer at fylgja vi› málinum, og ta› má ikki henda, at fornminnini skola burtur, sigur hann.

Um myndugleikarnir koma til ta ni›urstø›u, at fornminnini eiga at ver›a grivin út, so fer Tórbjørn Jacobsen at royna at fáa pengar til vega til útgrevsturin.

## Bló›skeivt at lønarhækkingar hava økt útrei›slustø›i›

Sosialurin umrøddi ígjár broytingaruppskoti› hjá Javna›arflokkinum og Sambandsflokkinum, sum skal for›a fyri at renturstu›ulin nú 1. jan. ver›ur settur ni›ur úr 48% ni›ur í 44% og seinni ni›ur í 40%. Men tíverri skilst av greinini, sum um eg skal hava sagt, at ta› høga útrei›slustø›i› hjá føroysku húsarhaldunum »partvíst skyldast lønarhækkingunum, sum hava veri› á arbei›smarkna›inum«.

Hetta er ikki veruleikin. Tvørturímóti er veruleikin, at løntakararnir hava veri› fyri stórum reallønarfalli› seinastu árini. Sí›ani ársbyrjan 1998 hevur veri› ein prísvøkstur uppá 15%. Sama tí›arskei› er arbei›smannalønin bert vaksin 10%. Reallønin er tískil fallin vi› 5%. Og hetta er hent í einum tí›arskei›i›, har vøksturin í bruttutjó›arúrtøkini hevur veri› tilsamans 32%. Eisini kann nevnast, at í sama tí›arskei›i› eru sethúsaprísirnir hækka›ir vi› meir enn 20% í mi›al fyri alt landi›.

Í eini komandi grein skal eg nærri l‡sa hesa gongdina. Men er ta› naka› sum kann sigast um lønarhækkingingarnar, er ta› hetta, at tær áttu at veri› hægri, um tær skuldu fylgt vi› prísvøkstrinum, og enn hægri, um løntakarar skuldu fingi› sín part av tí alstóra vøkstrinum, sum seinastu árini hevur veri› í vir›isskapanini í føroyska samfelagnum.

**Hans Pauli Strøm,**
**løgtingsma›ur**



# Smyril Line og stóra ætlanin

**Verkætlanin at byggja n‡ggja Norrønu er størsta ætlan hjá nøkrum føroyskum felag nakrantí›**

SMYRIL LINE
*Ey›un Klakstein*

Smyril Line, sum hevur næstan 20 ár á baki, er komi› í vandasjógv. Felagi› manglar pengar til at gjalda avdrátt fyri n‡ggju Norrønu, og fíggjarligi tørvurin er stórur og átrokandi.

T‡sdagin 27. juni var endaligi byggisáttmálin til n‡ggju Norrønu undirskriva›ur.

Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, og Fred Garde, stjóri á Flensburger Schiffbau-Gesellshaft (FSG), settu síni nøvn á sáttmálan, og aftaná var› skála› vi› sjampanju.

N‡ggja Norrøna er tann størsta og d‡rasta verkætlanin, sum naka› føroyskt felag nakrantí› er fari› undir. N‡ggja skipi› kostar um 660 milliónir krónur.

Men fyri pengarnar skuldi Smyril Line eisini fáa eitt rættiligt mærglætisskip vi› gosba›i, svimjihyli, sauna, solarium og øllum hugsandi hentleikum. Skipi› skal taka 1600 fer›afólk og einar 1000 bilar.

Tá byggisáttmálin var› undirskriva›ur seg›i Óli Hammer, at Smyril Line mátti tryggja sær eini 30.000 fer›afólk fleiri til Norrønu, so tali› kundi koma upp á 100.000 fólk um ári›. Ta› er tí eitt vónbrot fyri felagi›, at færri fólk hava siglt vi› Norrønu í ár enn í fjør.



### Ymiskt virksemi

Smyril Line var› stovna› í 1982, og sí›ani hevur felagi› havt Norrønu siglandi millum Føroyar og grannalondini.

Í fjør var› virksemi› hjá Smyril Line ví›ka› til at umfata eina farmalei› eisini, og Smyril Line hevur lagt nógvar pengar í at fáa hesa lei› at virka. Felagi› hevur farmastø›ir í Hanstholm, Kolding og Hedehusene, umframt at felagi› hevur leiga› farmaskipi› Tango í summarhálvuni, tá Norrønu røkir vanligu siglingina.

Smyril Line eigur og rekur Hotel Føroyar, og felag› er høvu›spartaeigari í P/F Útfer›ir, i› rekur skonnartina Nor›l‡si›. Smyril Line lat í 1999 n‡tt vallarheim byggja í grannalagnum hjá Hotel Føroyum vi› Oyggjaregin.

Smyril Line er ein av stovnarunum av føroyska oljufelagnum Atlantic Petroleum.

Partapeningurin í Smyril Line er 15 milliónir krónur, og landi› er størsti einstaki partaeigarin vi› 18% av partapeninginum. Nógvir føroyingar eiga smærri part í Smyril Line.

